# Innihaldsyvirlit


Innihaldsyvirlit 1
Útbjóðingarskriv viðvíkjandi telefoni hjá Almannaverkinum 2
Útboðstilfarið 2
Yvirlit yvir telefonhald 2
Tilboðsfreist og innlatingaradressa 2
Spurningar 2
Meting av tilboðum 3
Framferð í sambandi við meting av tilboðum 3
Fyrivarni/Alternativ tilboð 4
Freist ið tilboð stendur við 4
Minstu krøv 4
Krøv í samband við nýggja avtalu 4
Krøv til tilboðið 4

# Útbjóðingarskriv viðvíkjandi telefoni hjá Almannaverkinum

Almannaverkið (hereftir "AV") heitir við hesum á tykkara fyritøku at geva tilboð uppá omanfyristandandi uppgávu.

Almannaverkið hevur tørv á ymiskum haldum. Grundhald (ikki neyðugt við data), hald við ymiskum støddum av data, hald við samrøðum í norðurlondum, evropa og restina av heiminum.

Útboðið verður framt sum eitt:

- *Alment útboð sambært rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum.*

# Útboðstilfarið

Útboðstilfarið er samansett av:

- Hesum útbjóðingarskrivinum

# Yvirlit yvir telefonhald

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir verandi hald hjá Almannaverkinum.

| | |
|---|---|
| GSM Fríhald 8GB | 264 |
| GSM Fríhald 4GB | 65 |
| GSM-Grundhald | 42 |
| GSM Fríhald 16GB | 6 |
| Data hald 10GB | 3 |
| datahald | 3 |
| Data hald 300GB | 2 |
| GSM Fríhald 32GB | 2 |
| Data hald 1GB | 1 |
| Data hald 300MB | 1 |
| GSM frítíð | 1 |

*Datahald til alarmar 600

*Hjálpartól hava brúk fyri áleið 600 simkortum til alarmar ið senda signal til vaktsentral á LS. Talan er um data hald við væntaðari nýtslu á 10 MB data.

# Tilboðsfreist og innlatingaradressa

Tilboð skulu latast inn talgild til Fyrisitingarleiðaran á Almannaverkinum, Jan Sjóstein, jans@av.fo.

Freistin at lata tilboð inn er:

***11.12.2020 klokkan 13.00***

Tilboð, ið verða latin inn aftaná hesa freist. verða ikki viðgjørd.

# Spurningar

Spurningar skulu setast á føroyskum og í telduposti til Jan Sjóstein, jans@av.fo.
Spurningar skulu setast í seinasta lagi 27.11.2020, kl. 13. Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Svar verða atkomulig fyri allar tilboðsgevarar í seinasta lagi 04.12 2020.

# Meting av tilboðum

Tillutanartreytin er besta lutfall millum prís og góðsku við hesum vektaðu undirtillutanartreytum:

1. Kostnaður 50 %
2. Dekningur 25 %
3. Sjálvgreiðsla 25 %

### Viðv. 1.

Við undir tillutarnartreytini kostnað skal skiljast tilboðið við tí lægsta tilboðsprísinum.

Í metingini verður dentur lagdur á lægsta prís.

Tillutarnartreytin kostnað verður mett út frá tí samlaða tilboðnum hjá tilboðsgevaranum.

### Viðv. 2.

Við tillutarnartreytini ´Dekningur´ skal skiljast, hvussu deknigurin hjá veitaranum er í Føroyum og í hvønn mun tilboðsgevarin ger sannlíkt, at hann fer at veita Almannaverkinum tann besta dekningin og í hvønn mun veitarin kann prógva hetta. Almannaverkið vil í hesum sambandi loyva sær at heinta inn royndir frá øðrum stovnum og fyritøkum í Føroyum.

### Viðv. 3

Sjálvgreiðslan skal sum tað minsta geva góð yvirlit yvir hald og brúk av telefon og data. Harumframt skal verða gjørligt at stovna, niðurleggja og broyta hald. Har afturat skal síggjast greitt yvirlit yvir rokningar og meirnýtslu.

### Svar til meting

Svarið hjá tilboðsgevara til undirtillutarnartreytirnar ´Dekkningur´, ´Totalview´ og Sjálvgreiðsla eigur ikki at rúma meira enn 5 A4 síður tilsamans við teksti og myndum.

Tilboðsgevarin eigur at leggja seg eftir, at svara hvørjari undirtillutarnartreyt ítøkiligt gjarna við serstøkum punkti.

# Framferð í sambandi við meting av tilboðum

Tilboðini, sum lúka minstukrøvini, verða mett út frá einum prísmyndli við denti á omanfyristandandi treytir.

Prísurin er tann samlaði tilboðsprísurin, sum skrivað í framsíðuni á tilboðslistanum.

Tann, sum hevur besta prísin, fær fult stigatal, sum er 50 stig, í metingini av prísinum, og hinir tilboðsgevararnir fáa stig í mun til besta prís.

Meting av "dekningur" verður grundað á, hvussu væl loysnin lýkur krøvini, og tilboðsgevarin kann í mesta lagi fáa 25 stig.

Meting av sjálvgreiðsluni verður grundað á, hvussu væl loysnin nøktar tørvin hjá AV. Tilboðsgevarin kann í mesta lagi fáa 25 stig.

Tilboðið við flestu stigunum fær tilluta uppgávuna.

# Fyrivarni/Alternativ tilboð

Tilboð við fyrivarni kunnu verða havnað. Tað hevur alstóran týdning, at alternativ tilboð eru greið og kunnu samanberast.

# Freist ið tilboð stendur við

Tilboð skal standa við í 60 arbeiðsdagar frá, at tilboðsfreistin er farin.

Kunning um avgerð um tillutan ber ikki í sær, at tilboðsgevari er frítikin frá sínum tilboði.

# Minstu krøv

Almannaverkið brúkar Totalview bæði til skráseting av tíð og sum telefonskipan.

Í metingini av undirtillutarnartreytunum ´Totalview´ verður dentur lagdur á:

- Í hvønn mun tilboðsgevarin tryggjar fullan kombatibilitet við tænastuna ´Totalview´ og Totalview appina.
  (Við fullan kombatibilitet meinast, at allir hentleikar viðvíkjandi telefoni sum í dag eru tøkir í skipanini skulu rigga)

# Krøv í samband við nýggja avtalu

Um Almannaverkið skal skifta veitara, skal latast inn ein útgreinað tíðarætlan yvir teir aktivitetir, ið skulu til fyri at fremja eitt skifti. Almannaverkið skal ikki hava eyka útreiðslur av einum skifti, og tí er tað veitarin, ið bert allan kostnaðin av einum skifti.

# Krøv til tilboðið

Tilboðið skal lúka krøvini, sum standa í útboðstilfarinum.

Um tilboðið ikki lýkur omanfyristandandi krøv, kann tað í síni heild, verða mett sum ikki at lúka tær treytir, sum standa í útboðstilfarinum.

Almannaverkið er ikki bundið at taka av omanfyristandandi tilboði frá tilboðsgevaranum.

Um Almannaverkið tekur av tilboðnum er avtalan galdandi í 3 ár, við møguleika fyri leingjan tvær ferðir við einum árið.

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Jan Sjóstein
Fyrisitingarleiðari
Almannaverkið